# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Eitt diplomatiskt bragd

Heilt síðan 2004 hava avvarandi føroyskir myndugleikar roynt at vinna føroyskari gransking fótafesti í sonevnda 7. rammuprogramminum hjá ES fyri gransking. Hetta hevur sum við øllum, ið hevur við ES at gera gingið sera striltið, og ES hevur eftir øllum at døma verið sera avvísandi mótvegis Føroyum. Vit hava í hesum teigi fleiri ferðir sett spurnartekin við tilgongdina í hesum máli. Men nú er vend komin í, og tað hevur veruliga eydnast løgmanni á fundi í Bruxelles í síðstu viku við ES kommisserurin í granskingarmálum at fáa gongd á málið. Hetta merkir við øðrum orðum, at ES kommiserurin í granskingarmálum, Janez Potocnik, hevur givið politiskt lyfti um føroyskan atlimaskap í ES granskingarskipanini FP7. Løgmaður hevur alla orsøk til at fegnast um hetta framstig, tí atlimaskapurin í FP7 fer at hava ómetaliga stóran týdning fyri gransking í Føroyum. Men løgmaður hevur aðrar orsøkir til at fegnast, tí hann hevur her framt eitt satt diplomatiskt bragd, sum hann eigur stóra viðurkenning fyri. Hetta so mikið meira, sum nógv bendir á, at tað í uttanlandsfyrisiting løgmanns ikki hava verið stórar vónir um eitt jaligt úrslit í hesum máli yvirhøvur.

Samantikið kann staðfestast, at løgmaður á uttanlandspolitiska økinum hevur stór úrslit at vísa á eitt nú atlimaskap í FAO, og nú dyrnar opnar fyri atlimaskapi í sjeyndu rammuprogramminum. Tað næsta, sum hendir, er , at ES Nevndin leggur eitt uppskot til samráðingarheimild fyri Ráðharraráðið. Eftir at samráðingarheimildin er góðkend, fara Føroyar og ES undir samráðingar um ein sínámillum sáttmála, ið ásetur, at Føroyar verða atlimur í FP7. Sáttmálin verður síðan lagdur fyri Ráðharraráðið og Løgtingið til góðkenningar.

Hví hevur hetta mál so stóran týdning og hevur hetta yvirhøvur nakran praktiskan týdning fyri Føroyar eru tað mong, sum spyrja. Svarið er, at landsins myndugleikar langt um leingi tykjast at hava ásannað, at gransking og nýmenning eru altavgerandi fyri framgongd og menning í nútímanssamfelagnum. Føroyar eru í ferð við at flyta seg frá at vera eitt vøruframleiðandi samfelag til eitt vitanarsamfelag. Í hesum samanhangi er gransking ein avgerandi táttur. Føroysk gransking er komin á eitt vegamót, har tað er altavgerandi at sleppa longur inn í altjóða granskingarsamstarv. Í hesum høpi er seynda rammuprogrammið hjá ES av alrastørsta týdningi. Her er tí talan um eitt veruligt framstig, sum øll eiga at fegnast um.

**Sosialurin**

## (Skúla)bókasøvnini og PISA - viðmerking til Mortan Hentze

**SOLVEIG DEBESS**
skúlabókavørður



Tað er stórt spell, um vit nú skulu brúka PISA-úrslitið til runublak millum fólkabókasøvn og skúlabókasøvn. Tíðin má heldur vera komin til, at vit í felag royna at fáa sum mest burturúr tí avmarkaða tilfeinginum, sum vit verða tillutað. Serliga úti á bygd er tað neyðugt at samstarva!

Nú er tað soleiðis, at lesing er tengd at einum stórum parti av tí virksemi, sum er innan skúlagátt, og tí eigur skúlabókasavnið eisini at kunna bjóða eitt tíðarhóskandi og fjølbroytt úrval av yrkisbókum og føgrum bókmentum, sum næmingar (og lærarar! – kanska foreldur við) kunnu læna og lesa bæði í sambandi við skúlaarbeiði og til frítíðarlesnað.

Bøtast kann bert um lesiførleikan við at lesa – og lesa – og lesa. Eg eri púra samd við Mortani, tá ið hann førir fram at foreldur sum lesa, eiga børn sum lesa.  Líkindini at fáa børnini at lesa eru í hvussu er betri, um foreldrini eru góðar fyrimyndir á hesum økinum. Men tað er als ikki rætt, tá sagt verður, at vit fáa ikki fleiri foreldur og børn sum lesa við at leggja orkuna í at styrkja smáu skúlabókasøvnini.

Skúlabókasavnið – ella námsfrøðiligi tænastudepilin, sum tað verður rópt í fólkaskúlalógini frá 1997 og í bókasavnslógini frá 2001 – er sera týdningarmikið í øllum virksemi skúlans. Mortan orðar tað soleiðis: Skúlabókasøvnini eru fyrst og fremst eitt amboð, sum børnini eiga at brúka í samband við teirra virki innan skúlagátt, og skúlabókasøvnini eiga sjálvandi at vera útstýrd til hetta endamálið.

Hesum eri eg samd í. Skúlabókasavnið er staðið, har upplýsingar kunnu fáast úr bókum og øðrum miðlum – hetta kann skúlabókavørðurin vegleiða um og hjálpa við. Skúlabókasavnið eigur eisini at vera staðið, har næmingar hava møguleika at viðgera upplýsingarnar, teir hava funnið fram – hetta dugir skúlabókavørðurin eisini at vegleiða um. Somuleiðis eigur skúlabókasavnið at vera so rúmsátt, at til ber at formidla nýggju vitanina til onnur gjøgnum framløgu, framsýning ella annað. Og til hetta arbeiði er tað gott at hava ein skúlabókavørð á síðulinjuni!

Skúlabókasavnið eigur at vera lætt atkomiligt hjá øllum. Sum er hava vit alt ov nógv skúlabókasøvn kring landið, sum halda til í smáum, trongum skotum, og sum tí heldur ongantíð verða ment til nakran námsfrøðiligan tænastudepil. Um skúlabókasavnið/námsfrøðiligi tænastudepilin skal gerast liður í dagliga virksemi skúlans, sum tað er orðað í Kunngerð um skúlabókasøvn frá 2004, eigur tað sjálvsagt at liggja væl fyri á skúlanum, og tað eigur at vera mannað allar skúlatímar við útbúnum skúlabókavørðum. (Í hesum sambandi skal eg skoyta uppí, at skúlabókasøvn júst hava fingið pláss í miðjuni í fleiri skúlum, sum verða bygdir og útbygdir kring landið í hesum døgum – fleiri av hesum skulu í framtíðini sum kombinerað skúla- og bygsasøvn).

Mortan skrivar, at vit heldur eiga at byggja og reka nøkur fá og dygdargóð fólkabókasøvn. Eg eri samd í, at vit skulu byggja dygdargóð fólkabókasøvn, men tað skal ikki vera í staðin fyri skúlabókasøvn. Eingin dugir betri enn skúlabókavørðurin (sum er lærari við víðaraútbúgving) at finna røttu bókina til rætta (skúla)næmingin. At okkum tørvar nógv fleiri føroyskar bøkur til børn og ung at velja ímillum, er ein annar álvarsligur spurningur, sum ikki skal viðgerast í hesum umfari.

Eg dugi ikki at síggja, at hetta skal vera eitt antin/ella – antin skúlabókasøvn ella fólkabókasøvn. Í staðin áttu vit heldur at ganga saman um at siga bæði/og – vit skúlabókavørðir og bókavørðir skulu í felag heita á myndugleikarnar í landi og kommunum um at bera so í bandi, at vit fáa dygdargóð skúlabókasøvn og líka so dygdargóð fólkabókasøvn, so øll kunnu fáa júst ta bókasavnstænastu, tey hava tørv á!

At skúla- og fólkabókasøvn summa staðni fara at rúmast í sama høli, sum tey nú gera í nógvum millumstórum bygdum, er kanska ikki tað optimala, men tað er kortini skilabetri at brúka orku og pengar uppá eitt kombinerað skúla- og fólkabókasavn enn slettis ikki at hava nakað, tí tað hevði verið avleiðingin nógvastaðni, um tað bert verður satsað uppá at byggja nøkur fá fólkabókasøvn.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.